# Bók um uppvøkstur í Klaksvík í fimmtiárunum

**Christoffer Jensen í Klaksvík hevur skrivað bók um uppvøkstur í Klaksvík í fimmtiárunum, nevnd »Ziskatrøðbrekkan«. Bókin verður løgd fram í Norðoya Sparikassa fríggjakvøldið**

BÓKAÚTGÁVA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Um miðjan november 2006 kemur út bók um at vaksa upp á størri bygd í 1950-unum. Tað er klaksvíkingurin Christoffer Jensen, sum fortelur frá hesi turbulentu broytingartíð við politiskari frustrasjón, sosialari ónøgd, arbeiðsloysi og doktarastríði, soleiðis sum hann upplivdi tíggjuáraskeiðið.



*Christoffer Jensen í Klaksvík hevur skrivað bókini »Ziskatrøðbrekkan«, sum er um at vaksa upp í Klaksvík í fimmtiárunum - sum var ein turbulent broytingartíð við politiskari frustrasjón, sosialari ónøgd, arbeiðsloysi og doktarastríði*

Bókin ber heitið »Ziskatrøðbrekkan« við tað, at snúningsásin í frásøgnini er »brekkan«, har høvundurin vaks upp í Klaksvík.

Framløga av bókini verður í Norðoya Sparikassa í Klaksvík fríggjakvøldið 10. november 2006 klokkan 20.00.

Á skránni er:

Frásøgn, upplestur, undirhald, sangur og okkurt søtt. Hans Hjalti Skaale og Klaksvíkar Hornorksetur luttaka eisini.

Bókin, ið er 282 síður við bleytari permu, teksti og myndum, kostar 250 kr í bókabúðunum og kemur út á egnum forlagi.




# DR setti fokus á Føroyar

**Bæði politikkarar, samkynd og markantir talsmenn komu til orðanna, tá danska útvarpsrásin P1 hjá Danmarks Radio setti fokus á Føroyar og støðuna hjá samkyndum í okkara samfelagi**

MANNAMUNSGREININ
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Danska útvarpstøðin P1, ið er partur av Danmarks Radio setti leygardagin í ein hálvan tíma fokus á Føroyar og málið um mannamunsgreinina. Tosað var við Løgmann Jóannes Eidesgaard, løgtingslimirnar Jenis av Rana, Óla Breckmann og Finn Helmsdal. Við tríggjar samkyndar føroyingar: Rasmus Rasmussen, ið livur opið sum




samkyndur, ein, ið rópti seg Jón og sum livdi dupultlív, sum pápi og maður fyri familjuna og virkin í eini meinigheit og handan niðurrullaðar gardinir sum virkin samkyndur og unga leivíkingin Karsten Høgnesen, ið segði seg vera grøddan fyri sín samkyndleika. Eisini varð tosað við Niels Arge Galán sangara í 200 og við Hvalvíksprest Mogens Tilsted Christensen. Málið varð lýst gjølla í út við trý korter.

Sendingin handlaði um hvussu Føroyar í er ein partur av vesturheiminum, velur ikki at virða grunnleggjandi mannarættindini, og roynt var at lýsa hví so var. Sendingin varð upprunaliga send í juni, men varð nú endursend í sambandi við aktuella kjakið, og bæði frammanundan og eftir sendingina vóru kvinnurnar handan sendingina í útvarpshølinum og tosaðu um núverandi støðu. Hetta er enn eitt dømi um, hvussu umdømið hjá Føroyum verður skatt av málinum, ið hevur deilt føroysku tjóðina. Í løtuni hava yvir 18.000 fólk undirskriva mótmæli ímóti føroyska politikkinum á heimasíðuni act-against-homophobia. underskrifter.dk, og her er talan um fólk úr nógvum ymiskum londum, men meirilutin er úr Íslandi og Danmark, ið eru lond við fegin sammeta okkum við.




Á Tænastudeildini starvast 2½ málsviðgerar og ein deildarleiðari. Høvuðsuppgávurnar hjá deildini eru at taka telefon, taka ímóti viðskiftafólki, skráseta allan innkomnan post o.a.

Málsviðgeri
til Almannastovuna

Hevur tú hug at royna teg í einum arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning, so er eitt fulltíðarstarv sum málsviðgeri á Tænastudeildini leyst at seta skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Anne Djurhuus, deildarleiðara, á tlf. 35 35 10 ella við at fara inn á heimasíðu okkara www.almannastovan.fo ella www.portal.fo.

Umsóknarfreistin er 24. nov. 2006 kl. 12.00.

KREA.FO - TEL 47 80 80

almannastovan
www.almannastovan.fo



SØLUSAMSKIPARI

Samferðsludeildin á Strandferðsluni sóknast eftir dugnaligum sølusamskipara

Sum sølusamskipari ført tú ábyrgd av tilrættalegging og samskipan av ferðaseðlaskipanini á Bygdaleiðum og Oyggjaleiðum.

Høvuðsuppgávurnar eru:
- at menna og fyriskipa tænastur til kundabólkarnar
- at umsita ferðaseðla- og hagtalsskipanina Buscom
- at umsita útgerð og viðlíkhald av ferðaseðlamaskinunum
- at fyriskipa dagligu rapporteringina til kundaavrokning og hagtøl
- at fyriskipa eftirlit við ferðaseðlasøluni
- at fyriskipa mannagongdir, vegleiðingar og undirvísing

Talan er um eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú eisini arbeiðir við øðrum uppgávum, sum fevna vítt innan virksemið hjá Samferðsludeildini. Eitt nú ført tú um hendi at røkja heimasíðutænastuna og uttanhýsis kunningina um samferðslu. Av størri projektum, sum tú verður við í, kann nevnast fyrireikingar til nýggja ferðaseðlaskipan.

Uppgávan hjá Samferðsludeildini er at skipa almenna samferðsluøkið. Vit leggja til rættis, stýra, selja, samskipa og kunna um almennu ferðsluna á sjógvi og landi. Árliga sølan er uml. 43 mió. kr.

**Førleikakrøv**
Vit rokna við, at tú
- hevur útbúgving ella royndir innan handil, logistikk ella líknandi,
- hevur gott hegni og góðan førleika innan KT
- er røkin, málrættað/-ur og arbeiðir sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni og góðan tænastuhugburð
- orðar teg væl, bæði munnliga og skrivliga

**Umsókn og treytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er 13. november kl. 12. Send umsóknina við prógvskjølum og møguligum viðmælum til: Strandfaraskip Landsins, stílað: Starvsfólkadeildin, Boks 88, FO-110 Tórshavn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Andrass Jensen, deildarleiðara, á telefon 34 30 00 ella t-post anj@ssl.fo

sansir.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS